ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 5. mars 2010

# Feløgini vilja víðka deildirnar

**Hondbóltsfeløgini samdust á fundi í gjárkvøldið um, at tey skulu senda Hondbóltssambandinum eina áheitan um at víðka bestu deildirnar upp í sjey ella átta lið, so eingin niðurflyting verður, tá henda landskappingin er liðug**




Hilmar Jan Hansen



StÍF og VÍF eru tvey av fimm feløgum í manshondbóltinum, ið annaðhvørt enda í FM-finaluni ella á aftasta plássi

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Eina ferð í dag fær Hondbóltssambandið eina áheitan frá øllum førum 11 av 14 hondbóltsfeløgum, har ynski verður sett fram um at víðka bestu deildirnar hjá kvinnum og monnum, so tær í mesta lagi telja átta lið. Feløgini eru samd um, at ráð snøgt sagt ikki eru til, at hondbólts-Føroyar gerast minni.

Hetta var úrslitið av einum fundi, sum hondbóltsfeløgini í gjárkvøldið høvdu í ÍSF-húsinum. Feløgini hava áður ynskt at fingið í lag ein limafund um málið, men tá innkallingin til slíkan fund dró út, tóku feløgini sjálvt stig til eina beinleiðis áheitan.

– Vit vóru samd um, at neyðugt var at koma við hesi áheitan undan dystunum um vikuskiftið, tí vit hildu ikki, at tað bar til at bíða longur, sigur Gunn Ellefsen, næstformaður í H71, sum hevði staðið fyri innkallingini til fundin, har eini 20 fólk vóru møtt.

– Semja var um, at hetta var eitt mál, ið feløgini áttu at taka avgerð um, og í áheitanini stendur ikki meira enn tað, at hetta ynskja feløgini. Nærri treytir fyri, hvussu deildirnar skulu víðkast, mugu viðgerast á einum limafundi, sum Hondbóltssambandið kallar inn til.

### Vilja hyggja at tí

Hondbóltssambandið boðaði annars herfyri frá, at ætlanin ikki var at taka málið upp til viðgerðar fyrr enn eftir kappingina, men hesum eru feløgini ímóti, tí tey vilja hava eina avgerð um talið á liðum í Sunset- og Atlantic Airways-kappingunum sum skjótast.

– Tað gjørdu vit, tí vit ikki vildu taka spenningin úr kappingini. Og tá kappingin varð broytt til tað, sum hon er nú, var tað eisini eftir eina lokna kapping, at tann avgerðin varð tikin. Tí hildu vit tað vera rættast, at vit gjørdu upp á sama máta, um nakað skuldi broytast aftur, sigur formaðurin í Hondbóltssambandinum, Kristian Johansen, sum vísir á, at kappingin verður eftirmett á hvørjum ári.

Hann hevði enn ikki sæð ella fingið áheitanina frá hondbóltsfeløgunum, tá vit tosaðu við hann fyrrapartin, so hann fekk illa gjørt ítøkiligar viðmerkingar til hana. – Men eg kann siga so mikið, at vilja feløgini hava broytingar framdar nú, so vilja vit sjálvandi hyggja at tí, sigur formaðurin í Hondbóltssambandinum.

## FSF fær nýggjan stjóra

Fótbóltssambandið skal nú hava ein tekniskan stjóra, ið skal vera fakligur leiðari og hava ábyrgd av venjaraútbúgvingini, leikaramenningini og U-landsliðsvenjarunum. Somuleiðis skal tekniski stjórin eitt nú seta møguliga talentmenning í gongd og framleiða føroyskt fótbóltstilfar.

Viðkomandi, ið verður settur, skal hava í minsta lagi UEFA A-venjaralisens, umframt drúgvar royndir sum venjari á høgum stigi og royndir sum venjarainstruktørur. Eisini krevjast fyrisitingarligir førleikar og kunnleiki til enskt og KT.

Talan er um eitt nýtt starv í Fótbóltssambandinum, ið ynskir at fáa tað sett sum skjótast. Freistin at søkja er úti 22. mars.

**hil**

### SÍ-ÍF 3-1 (22-25, 25-17, 25-20, 25-19):

## SÍ einki sannførandi

Tað sást ikki nógv til, at SÍ er FM-finalistur í Eik-liguni hjá monnum, tá liðið í gjárkvøldið tók ímóti ÍF í Sørvági. Spælið hekk illa saman og tað tóktist, sum tóku menn ikki uppgávuna í nóg stórum álvara. Úrslitið var eisini hareftir, tí hóast SÍ vann dystin, gjørdist talan um ein alt annað enn sannførandi sigur.

ÍF var hinvegin til reiðar at vísa, at veiki innsatsurin mikukvøldið ímóti Mjølnir ikki skuldu endurtaka seg. Og meðan SÍ helt, at dysturin kundi vinnast av sær sjálvum, gjørdi ÍF bart í fyrsta settið og vann tað.

Fuglfirðingar vóru íðnir á gólvinum og fingu nógv uppaftur, og eisini lá væl fyri hjá teimum at blokka, meðan tað hinvegin restaði nógv í í álopsspælinum, sum eisini í undanfarnu dystunum hevur verið størsti trupulleikin – serliga, tí móttøkurnar ikki hava verið nóg góðar.

SÍ byrjaði við Raiko Petrovic uttanfyri, men tá hann kom inn í øðrum setti, bøtti tað munandi um slagkraftina, men flutti hinvegin ikki tann veruleika, at SÍ gjørdi munandi fleiri servufeilir enn vanligt og ongantíð veruliga kom í gongd. Sørvingar noyddust sostatt at stríðast við bæði seg sjálvan og fuglfirðingar, áðrenn 3-1 sigurin at enda varð fingin til høldar.

**hil**

### Flogbóltur

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 14 | - | 3 | 44 | 16 | 28 | 21 |
| 2 | SÍ | 16 | 12 | - | 4 | 40 | 21 | 19 | 18 |
| 3 | Fleyr | 16 | 6 | - | 10 | 32 | 35 | -3 | 8 |
| 4 | ÍF | 17 | 0 | - | 17 | 4 | 48 | -44 | 0 |

## Flogbóltsfinalur í Trongisvági

Í morgin verða FM-finalurnar í fýra av teimum yngru deildunum í flogbólti spældar í ítróttarhøllini í Trongisvági, har lagt verður til brots klokkan 10 fyrrapartin og endað langt út á seinnapartin. Spælt verður á serliga flogbóltsgólvinum, ið eitt nú varð brúkt til steypafinalurnar hjá teimum vaksnu herfyri.

Sum vanligt, verður eisini í aðrar mátar nógv gjørt burtur úr hesum stóra finaludegnum, sum TB skipar fyri. Eitt nú fara ungir tónleikarar frá Pakkhúsi 4 at spæla á pallinum millum dystirnar, og lokalir politikarar og stuðlar fara at handa vinnandi liðunum heiðursmerki. Eisini verður besti spælari á hvørjum liði í hvørjari finalu heiðraður.

Fyrsta finalan verður klokkan 10 hjá dreingjum 14 ár, har Dráttur og SÍ spæla, og klokkan 12 møtast Fleyr og KÍF í finaluni hjá kvinnuunglingum. Klokkan 14 spæla TB og KÍF finaluna hjá gentum 14 ár, og síðsta finalan verður klokkan 16 millum mansunglingarnar hjá TB og Fleyr. Av tí at tær báðar síðstu finalurnar eru við lokalum liðum, verður skipað fyri ókeypis andlitsmáling frá klokkan 13.




Ongum nýtist heldur at ganga svangur í Trongisvági í morgin, tí kantinan borðreiðir allan dagin við stórum køldum borði.

**hil**

**Nógv verður gjørt burtur úr FM-finalunum hjá teimum yngru í Trongisvági**